Álit

í

løgtingsmáli nr. 39/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í anordning for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme (Myndugleikaflytingar vegna yvirtøku av farsóttarmálsøkinum)

Landsstýrismaðurin í heilsumálum, Margit Stórá, hevur lagt málið fram 17. januar 2023, og eftir 1. viðgerð tann 19. januar 2023 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 26. januar 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Landslæknan og landsstýrismannin í heilsumálum Margit Stórá.

Trivnaðarnevndin ásannar, at tað vóru avbjóðingar við farsóttarlóggávuni, sum arbeitt var eftir í tíðini, tá korona herjaði. Við fyriliggjandi lógaruppskoti verður lógin føroysk, men einastu broytingarnar eru myndugleikaflytingar, tvs. at uppgávurnar og heimildirnar hjá Landslæknanum viðvíkjandi farsóttum verða fluttar til Fólkaheilsustýrið og uppgávur og heimildir hjá danska ráðharranum og Sundhedsstyrelsen verða fluttar til landsstýrismannin í heilsumálum. Innihaldsliga verður lógin annars ikki broytt.

Formliga yvirtøkan av farsóttarmálsøkinum er sett til 1. januar 2024, og landsstýrismaðurin hevur upplýst fyri nevndini, at hetta tíðarskeiðið er nóg mikið til at byggja upp fyrisitingina í Fólkaheilsustýrinum og í Heilsumálaráðnum til tess at fyrisita økið.

Lógin er frá 2011 og var tá tann sama sum danska lógin. Danska lógin er broyt fleiri fer síðan tá, men í Føroyum hava vit ikki ynskt, at somu broytingar vóru gjørdar fyri Føroyar.

Trivnaðarnevndin heldur, at umframt sjálva yvirtøkuna, er neyðugt at endurskoða lógina “om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme” og tillaga hana meira til føroysk viðurskifti. Nevndin heldur, at neyðugt er at hava allar avvarðandi partar við. Í koronatíðini vóru ivamál millum partar, kanska serliga millum land og kommunur, hvussu lóggáva og praktisk viðurskifti skuldu handfarast.

Um hendan ella ein líknandi farsótt rakar okkum aftur, eiga allar tilbúgvingar at liggja klárar og greiðar linjur eiga at verða millum allar avvarðandi partar. Trivnaðarnevndin heldur, at besti hátturin at náa hesum, er at allir partur eru við í eini endurskoðan av lógini.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 7. mars 2023

Jørgen Niclasen formaður	Liljan Weihe næstformaður	Johan Dahl
Kaj Leo Holm Johannesen	Hans Jacob Thomsen	Súsanna Bertholdsen

Árni Skaale